


## FAKTA UM FINALUNA

### Kyndil-VÍF 36-22(15-13)

**Kyndil:** Rókur Akralíð 8, Josef Abrahamsen 8(4), Høgni Klein 5, Janus Einar Sørensen 4, Hjalti M. Jacobsen 3, Ragnar Stakksund 2, Marius Joensen 2, Hanus Johansen 2, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Hannis Wardum 1(1)
**VÍF:** Ingi Olsen 5, Sámal Joensen 4, Áki Olsen 4(2), Áki G. Olsen 3, Harald Bjørgvin 2, Agnar Joensen 2(2), John Zachariassen 1, Regin Joensen 1
**Brotskøst:** Kyndil 6(5), VÍF 7(4)
**Útvísingar:** VÍF 4
**Reytt kort:** Marius Joensen, Kyndil
**Dómarar:** Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen
**Áskoðarar:** uml. 800

Kyndil fekk fýra tey fyrstu málini eftir steðgin, og harvið gjørdist munurin heili seks mál. VÍF royndi at koma aftur í aftur, men veruleikin er tann, at fyrsta korterið av seinna hálvleiki var ein stórur kollektivur niðurtúrur hjá vestmenningum. Kyndil vann nevnliga hesa løtu ikki minni enn 11-2, so tá ið seinni hálvleikur var hálvrunnin, høvdu vertirnar eina leiðslu, sum var heili 11 mál.

Tað tóktist sum um, at líka mikið hvat kyndilsmenn royndu seg við, so eydnaðist tað, meðan tað gekk av skriðuni hjá VÍF bæði í álopi og verju.

Eitt sindur undrunarvert var tað eisini hesa løtuna, at bonkurin hjá VÍF ikki royndi at broyta meira upp á liðið hjá sær. Tað blivið haldið fast um somu leikarar í alt ov drúgva tíð, og tá ið útskiftingar endiliga blivu framdar, var tað nógv ov seint, tí tá var dysturin avgjørdur, og allir vestmenningarnir vóru falnir í fátt, og talan var um ein kollektivan niðurtúrin hjá verjandi meistarunum.

### Uppiborið meistaraheitið

At tað fullkomiliga skramblaði saman hjá VÍF var óvæntað, men leygardagin var so ongin ivi um, hvat var betra liðið. Kyndil var í serflokki, og spælið hjá teimum gekk upp í eina hægri eind. Tað sást eisini týðuligani frá fyrsta bríksli, at havnarliðið var nógv grammari enn gestirnir, og spæligleðin lýsti úr hvørjum einasta leikara hjá teimum grønu. Vestmenningar hinvegin tóktust ikki veruliga trúgva uppá, at tað fór at bera til hjá teimum at vinna dystin, og tú sást ongantíð sama stríðsvilja á VÍF-liðnum, sum tú sást hjá Kyndli.

At Kyndil leygardagin fór avstað við meistaraheitinum, er eisini uppiborið, tí teir hava verið mest støðuga liðið hetta kappingarárið. Kyndil er kanska eisini tað liðið í Føroyskum manshondbólti, sum hevur breiðasta hópin, og tað hevur stóran týdning í einum drúgvum kappingarári. Leygardagin gjørdist talan um so mikið trivaligan sigur, at so at siga allir mans í hópinum sluppu at royna seg í finaluni, og allir tóku av, tá ið høvi beyðst.

